# NEISTIN ER

**HONDBÓLTUR** KÍF stendur ikki Neistanum kurl. Ikki enn, í øllum førum. Tað er niðurstøðan eftir steypafinaluna, tá Neistin staðfesti sína støðu sum einaráðandi í føroyskum manshondbólti og vann steypið til ognar

Uni Holm Johannesen

Jóannes Jakobsen var liðskipari, tá Føroyar vunnu 1-0 á Eysturríki í 1990. Hann segði undan dystinum, at tað verða 11 mans móti 11 monnum á vøllinum í Landskrona. Tá ber alt til. Undir vanligum umstøðum, væl at merkja. Hesa ferð var trupulleikin, at annað liðið er fleiri klassar oman fyri mótstøðuliðið.

Munurin millum Neistan og KÍF kann ikki samanberast við munin, sum var millum Føroyar og Eysturríki í fótbólti í 1990. Føroysku stríðsgarparnir prógvaðu tá, at tað ber til, hóast eingin væntar nakað av tær. Tað er hinvegin nógv, sum skal ganga tín veg, um tú skal koma á mál.

Kollfirðingar noyðast at sanna, at Neistin er fleiri klassar oman fyri teir. Hóast liðið, sum hevur verið einaráðandi í føroyskum manshondbólti seinastu árini, ikki spældi við fullari megi, so stendur KÍF teimum ikki kurl. Ikki uttan so, at teir spæla við fullari megi í ein samfullan tíma. Tað eydnast sjáldan.

Jan Ottesen er venjari hjá KÍF. Hann heldur, at tað var lítið veiggj í kollfirðingum hesaferð.

– Munurin er fimm mál, kanska meira. Vit spæla beinleiðis illa í stórum løtum av dystinum, og Neistin kundi vunnið við nógv fleiri málum, sigur hann bersøgin.

Agnar Joensen tekur undir við sínum venjara.

– Vit spæla ikki væl í dag. Tað er fult uppiborið, at Neistin vann so greiðan sigur. Vit mugu bara ásanna, at vit vóru ikki nóg góðir hesaferð, sigur Agnar Joensen.



*Sjúrður Thomassen, sum tók móti steypinum, stóð seg sera væl*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

### Runnu bara aftaná

Jan Ottesen og kollfirðingar royndu undir venjing í farnu viku at fyrireika verjuspælið til finaluna. Tað er hinvegin ikki lætt at seta fótonglar fyri ræðandi álopsstyrkini hjá Neistanum.

Heini Hanusarsson, sum skeyt fýra mál, ásannar, at tað var lítið veiggj í honum og Finni Hansson hesaferð.

– Tíbetur hava vit fleiri møguleikar í álopsspælinum. David Edvardsen var stórspælandi, Sjúrður Thomassen tók ábyrgd í avgerandi løtunum, og málverjarnir stóðu seg væl, serliga Bartal Hansen, sigur hann.

Lágvaksnu kollfirðingarnir høvdu tað torført móti stóru verjuni hjá Neistanum. Andrias Nielsen royndi at hótta frá høgra bakki, og Arnbjørn Hansen var eyðsýndur í løtum. KÍF hevði hinvegin ikki neyðuga hugflogið at spæla seg millum mótstøðuverjuna.

Arnbjørn Hansen ásannar, at KÍF hevði stórar trupulleikar.

– Tað kemur ikki beinleiðis óvart á meg, at vit fáa silvurheiðursmerki í dag. Neistin hevur fleiri spælarar, sum gera bart, tá tað stendur á. Vit hava torført við at fáa ferð á álopsspælið. Vit eru lágvaksnir, og neistamenninir eru høgir, og tí noyðast vit at dúva upp á skjótálop fyri tað mesta, sigur Arnbjørn Hansen, og leggur doyðin á, at kollfirðingar læra nógv hvørjaferð, teir spæla móti Neistanum.

KÍF hevði ikki nóg góða skotstyrki útifrá. Sæð burtur frá hóttanunum frá Andriasi Nielsen, noyddust teir at spæla seg ígjøgnum. Tað merktist eisini, at Gert Hansen og Niklas Reginsson, sum hava gingið fremst fleiri ferðir í ár, vóru lítið eyðsýndir.

Heini Hanusarson skeyt Neistan á sigurskós í fyrsta minuttinum, og verandi greipuvinnararnir stevndu móti sigrinum frá byrjan. Neistin var á odda allatíðina, og kollfirðingar vunnu seg ongantíð upp undir liðina á einaráðandi oddaliðnum í manshondbólti í løtuni. Tað var serliga eftir steðgin, at Neistin rann KÍF um koll, og at tað av álvara skrædnaði millum liðini.

Heini Hanusarson rósar kollfirðingum.

– Teir vóru ótrúliga óførir og spældu sín kjans. Eg haldi ikki, eg hevði væntað meira av teimum. Teir spældu skilagott og við disiplin, sigur hann.

Andrias Nielsen var millum mest eyðsýndu kollfirðingarnar. Hann var toppskjútti hjá KÍF við fimm málum. Hann er sannførdur um, at fyrri hálvleikurin leygardagin var millum slakastu avrikini hjá honum og viðleikarunum í hesum kappingarárinum.

– Vit gera eina rúgvu av mistøkum. Fyrri hálvleikur er eitt tað vánaligasta, vit hava spælt í ár. Vit royndu at hótta eftir steðgin, og munurin var trý mál eina løtu, men tað vísti seg, at Neistin var bara betri, sigur hann.

Neistin spældi í løtum við fullari ferð, stundum við ov nógvari ferð. Tað hevði púra óneyðug mistøk við sær, men KÍF revsaði ongantíð favorittarnar.

Agnar Joensen heldur, at høvdu kollfirðingar verið til reiðar beinanvegin í seinna hálvleiki, høvdu teir kunnað hótt leiðsluna.

– Fyrri hálvleikur er nærmast katastrofalur hjá okkum, og vit missa fótafestið beinanvegin eftir steðgin. Hóast tað, hava vit møguleikan at vinna okkum aftur, men vit framdu ov nógv mistøk, staðfestir Agnar Joensen.

### Tungt at vera stórfavorittur

Neistin var stórfavorittur undan dystinum. Høvuðsstaðarliðið hevur verið einaráðandi í føroysku hondbóltskappingini seinastu árini. Steypasigurin um vikuskiftið var tann triðji upp í slag. Felagið vann steypið til ognar hesaferð.

Úrslitini hjá Neistanum í hesum kappingarárið var grundarlagið fyri, at havnarmenninir vóru stórfavorittar undan dystinum. Finnur Hansson viðgongur, at tað er torført at vera stórfavorittur.

– Tað er tungt. Vit hava livað upp til heitið í landskappingini, men høvdu vit tapt í dag, hevði alt verið líkamikið. Tað prógvar okkara styrki, at vit vunnu, heldur hann.

uni@sosialurin.fo